# Kári vil broyta vallógina

**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins, vil broyta valskipanina soleiðis, at tingmannatalið hækkar úr 32 upp í 33 og at valdømini fækka úr sjey niður í fimm**

VALLÓGIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hvussu fáa vit eina rættvísari valskipan, spyr Kári P. Højgaard, sum vegna Sjálvstýrisflokkin fer at leggja uppskot um at broyta vallógina fyri tingið.

_ Svarið er ikki einfalt, og meiningarnar eru ivaleyst nógvar, svarar hann sjálvur.

Høvuðsbroytingin í uppskoti Sjálvstýrisfloksins er, at tingmannatalið hækkar soleiðis, at minsta talið av



*Kári P. Højgaard vil leggja nøkur valdømi saman, so vit tilsamans hava fimm valdømi*

valdum tingfólkum, sum í dag er 27, verður broytt til 28. Hetta eru tey umdømisvaldu tingfólkini. Hægsta talið av valdum tingfólkum, sum er 32 verður broytt til 33, t. v. s. at talið av eykavaldum tingfólkum verður framvegis fimm.

Í veruleikanum kann eitt valúrslit fella soleiðis, at 27 tingfólk verða vald. Men síðani seinastu broytingina í vallógini, sum varð framd fyri løgtingsvalið í 1978, hava allir teir eykavaldu tingsessirnir verið umboðaðir.

Kári P. Højgaard skjýtur upp, at valdømini eisini verða færri. Hann heldur, at Vága Sýslu valdømi og Norðstreymoyar valdømi skulu leggjast saman, og Sandoyar Sýslu valdømi og Suðuroyar valdømi verða løgd saman.

Á tann hátt metir hann, at býtið av tíngfólkum fyri hvønn íbúgva verður rættari. Í dag kostar ein tingsessur í Havn nærum tríggjar ferðir so nógvar atkvøður sum á Sandi, vísir Kári P. Højgaard á.

Umframt hetta mælir hann til, at roknihátturin verður broyttur soleiðis, at farið verður frá »d'Hondts roknihátti« til »Sainte-Lagües roknháttin«. Hetta merkir, at í staðin fyri at býta valúrslitini hjá flokkunum við 1, 2, 3, 4, o. s. fr., so verður býtt við 1, 3, 5, 7 o. s. fr.

Á seinasta løgtingsvalið gjørdist Tjóðveldisflokkurin triðstørstur. Kortini fekk hann flest tingfólk vald, tí býtið av tingsessinum fall so heppið fyri flokkin.

Sambandsflokkurin, sum hevði 611 atkvøður - t. e. 2.0% - fleiri atkvøður enn Tjóðveldisflokkurin, fekk ein tingsess færri.

Um vallógin varð broytt sambært uppskoti Sjálvstýrsfloksins - og úrslitið frá 2004 roknað eftir tí, so hevði Tjóðveldisflokkurin fingið eitt tingfólk færri (Finnur Helmsdal í Suðurstreymoy) og Sambandsflokkurin eitt fleiri (Bjørn Kalsø í Norðoyggjum). Tingið hevði verið mannað við 32 fólkum.

# Tørvur á rættvísari valskipan

**Hóast hann ikki tekur undir við uppskotinum hjá Kára P. Højgaard, so fegnast Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum, at vallógin verður viðgjørd á tingi. Tað fer at gagna víðari viðgerðini í Innlendis-máláráðnum, heldur hann**

VALLÓGIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Eg eri sera fegin um, at vit nú fáa eitt kjak um vallógina, sigur Jógvan við Keldu, innlendismálaráðharri, sum varðar av vallógini.

Hóast landsstýrismaður ikki vil veita uppskotinum sín fulla stuðul, so heldur hann, at hetta uppskotið hevur nøkur perspektiv, sum fara at ganga viðgerðini av vallógini, sum Innlendismálaráðið skal í gongd við.



*– Tað hevur stóran týdning, at vit fáa eitt so rættvíst býti av tingsessum sum gjørligt, heldur Jógvan við Keldu*

- Tað at hann leggur Vága sýslu valdømi og Norðstreymoyar valdømi saman og Sandoyar Sýslu valdømi og Suðuroyar valdømi fer sjálvandi at skapa kjak - og fólk eru ivaleyst ymisk á máli, um hetta nú er ta rætta, heldur Jógvan við Keldu.

Landsstýrismaðurin vísir á, at í Sundalagnum hava kommunur í Eysturoy og Streymoy lagt saman í Sunda Kommunu.

— Hetta fer sjálvandi eisini at ávirka støðutakan, tá støða skal takast til broytingar í valdømunum, heldur hann.

Hóast Innlendismálaráðið ikki enn hevur havt stundir at snikkað til eitt uppskot um broytingar í vallógini, so hevur ráðið fingið ymsar útrokningar og uppgerðir yvir, hvussu broytingar kunnu gerast.

- Men tað sum hevur týdning er, at býtið av tingsessum verður rættvísari. Tað skal verða soleiðis, at tann størsti flokkurin fær størstu umboðanina - ella ta rættvísu umboðanina, so vit ikki aftur fáa somu støðu sum í dag, at triðstørsti flokkur hevur størstu umboðanina á tingi, heldur Jógvan við Keldu.

Landsstýrismaðurin sigur eisini, at býti av tingumboðum í mun til fólkatalið eigur at verða rættvísari. Men hann heldur als ikki, at Føroyar skulu gerast eitt valdømi.

– Eg havi ongantíð verið fortalari fyri einum valdømi, tí eg haldi ikki, at tað gevur tað mest rættvísa býtið. Eg kann bara vísa á støðuna í Grønlandi, har tey fyri nøkrum árum síðani gjørdu landið til eitt valdømi. Har búgva 21 av 31 tingfólkum í høvuðsstaðnum, Nuuk, sigur Jógvan við Keldu, sum fegin vil gera broytingar í valskipanini, sum geva eitt meira rættvíst býti av tingumboðum millum flokkarnar og millum valdømini.

– Tað er ikki gagnlig við nakrari kollvelting á økinum. Men vit skulu gera tillagingar, sum gagna endamálinum, sigur Jógvan við Keldu, sum ikki væntar, at uppskotið hjá Kára P. Højgaard verður samtykt í løgtinginum. Men hann leggur dent á, at hann er fegin um at málið verður viðgjørt í tinginum, og hann er sannførdur um, at tað fer at ganga víðari viðgerðini av málinum í Innlendismálaráðnum.

# Fáa høvi at viðgera vallógina

VALLÓGIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Við uppskotinum hjá Kára P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum um at broyta valskipanina, sleppa tingfólk nú at viðgera vallógina, hóast einki uppskot er komið frá Innlendismálaráðnum hesum viðvíkjandi, hóast tað er niðurfelt í samgonguskjalið.

Jógvan við Keldu heldur ikki, at hetta er júst tann rætta loysnin, men hann er kortini fegin um uppskotið, tí hann heldur, at viðgerðin av hesum málinum á tingi fer at gagna víðari viðgerðini í Innlendismálaráðnum.

Seinasta broytingin í valskipanini var gjørd í sjeytiárunum, og fyrstu ferð roynd í verki í 1978. Tá var talið av eykamandatum minkað niður í 5 og talið av umdømisvaldum hækkað til 27. Síðani tá hevur løgtingið altíð verið fullmanna, hóast valúrslitið í prinsippinum kann fella soleiðis út, at eingi eykamandat verða at býta út. Tá hevði tingið bara havt 27 fólk.

Næstseinasta stóra broytingin var gjørd í sekstiárunum, tá farið varð frá at stilla valevni upp í nummarøð til tað skipanina, vit hava í dag. Tá høvdu valfeløgini størri ávirkan á, hvør kom at umboða flokkin á tingi, tí tann, ið stóð sum nummar eitt á listanum hevði fyrimunir fram um hini.

